# Demokratiskur týsdagur í oktober



*Høgni Djurhuus*

Fyrsti týsdagur í oktober er ikki ein vanligur, gráur oktobertýsdagur í Danmark. Fyrsta týsdag í oktober verður fólkatingið sett. Illa útbornu koloniirnar í Útnorðri eru við hesa stillu hátíðarløtuna hjá danska fólkaræðinum, sum verður send beinleiðis.

Okkara egna høga ting við lágu gáttini verður sett og sent beinleiðis, meðan næturnar enn eru so toluliga ljósar, 29.juli í einum øgiligum veitslurómi hvørja ferð. Vit eru langt framman fyri danskarar. Okkara fólkaræði er ein fest, og tað rennur seint av.

Til alla lukku er danski forsætisráðharrin ikki so øgiliga væl lýddur innangarðs beint nú, so føroyski bólkurin í Norðuratlantsbólkinum, sum nú gongur í fleiri bólkum, slapp undan einum vali í ótíð.

Tað hevði komið sera illa við hjá øðrum, skuldu veljararnir hjá Tjóðveldisflokkinum gera av, hvør er fittari, Høgni ella Tobbi.

Veljarakanningar geva ikki Anders nóg nógv júst nú, so væntaða fólkatingsvalið bleiv av ongum. Veljarakanningar hava givið fólkaræðinum ta innihald og ta meining, sum liggur í orðinum fólkaræði. Fimmhundrað, viðhvørt fleiri, fólk verða spurd, og so verður landið stýrt eftir svarinum, sum hevur flest prosent ella prosentstig.

Gravgangur er eftir at sleppa í fólkatingið. Tað er lætt at skilja. Tí Christiansborg er av sonnum ein borg. Tað er næstan sum at vera inni í einari aldagamlari kirkju sunnanfyri at ganga í teimum breiðu gongunum og trappunum á Christiansborg. Ella at standa eina løtu í sjálvum salinum, blunda og síggja søguna koma úr hvørjum króki. Har er so stórt, vítt, høgt og breitt, atmosfera. Funksjonell byggilist. Tað er ikki neyðugt at fara útum fyri at broyta hugsan ella taka annað skinn um bak.

Løgtingið hevur onga borg, bara eitt hús. Tað hevur íslendska altingið eisini, eitt hús. Har var keðiligur stemningur, tá altingið varð sett hesaferð. Fólk í andstøðuni rýmdu, tá altingsformaðurin fanst at forsetanum, sum skeit á fólkaræðið, sum lætst ikki síggja altingið, sum beindi fyri einari samtyktari lóg. Áhugavert og ikki minst harmiligt, at í andstøðuni í tinginum í einum Norðurlandi, sum reypar sær av at vera elsta demokrati í verðini, eru vinstravend, sum taka undir við og stuðla einaræði. Tað er ikki gott.

Koloniumboðini, trý av fýra, á Christiansborg løgdu hart út í nýggja fólkatingsárinum, longu fyrsta týsdagin í oktober. Danmark skal ikki hjálpa sildrekanum. Ein avgerð, sum ongan týdning hevur fyri Føroyar. Fiskimálaráðið torir ikki at taka avgerð um hvalaveiðu. Og vit keypa longu sum er sildrekatvøst úr Norra. Tað smakkar illa, siga tey. Men alt buldur og brak í frælsisstríðnum ger helst mun. Og formaðurin í Tjóðveldisflokkinum fekk sessin í Norðurlandaráðnum frá fólkatinginum, sum løgtingið ikki vildi geva honum.

Vit sluppu undan einum fólkatingsvali beint eftir kommunuvalið, Gallup og Vilstrup havi lov. Hvønn skuldu vit valt? Tey klókastu? Tað ber illa til, tí tey klókastu stilla ikki upp.

Eina ferð, eg var í einum selskapi, endaði eitt, sum vant, ósakligt prát við spurninginum, hvat er klókasta fólk í Føroyum? Onkur boð komu, leggi ikki á at nevna tey. Eg svaraði, at tað visti eg ikki, tí eg kenni ikki øll fólk í Føroyum. Fyrr í ár doyði ein maður í bestu árum. Eg kendi hann ikki, haldi ikki, at eg nakrantíð sá hann. Men tey, sum kendu hann, eru á einum máli um, at maðurin var klókur. Hann var, sum tey so frálíka væl siga í Vágum, logandi gløggur. Men tað vita bara tey fáu. Tí maðurin skrivaði ikki lesarabrøv, hann stillaði ikki upp, hann var ikki við í almenna kjakinum, tað eg veit. Men hann var klókari og gløggari enn tey flestu, sum har bjóða seg fram. Og hann er ikki nakað eindømi. Tey gløggu eru ov gløgg til at fara upp í harkaliðið, sum brúkar kjaft úti og inni, so tað hoyrist um allar geilar, eg sjálvur taldur uppí.

Hvat nyttar tað at hava rætt, tá tey, sum rópa harðast, fáa rætt?

So við virðing fyri teimum klóku og gløggu gevist eg her…!

# Kvinnuligur profetur fylti Vesturkirkjuna

VITJAN
*Maud Næs*



Týskvøldið 5. Oktober var profeturin,Vassula Rydén í Vesturkirkjuni í Tórshavn. Eitt heilt vanligt týskvøld í Havn, har øll altíð hava nóg mikið at fara til. Tó - høvuðstaðurin hevði eina heldur óvanliga vitjan - profetavitjan...Undarligt ljóðar tað og undarligt... at so nógv fólk, frá nær og fjar, ung og gomul, menn og kvinnur, ja, fólk frá øllum møguligum ymiskum trúarsamkomum í Føroyum, høvdu leitað sær í Vesturkirkjuna. Samlað vóru eini 800 fólk.

## Mannagongdin - tá profetur vitjar

Fitt áðrenn byrjan, fyltist kirkjan, meðan urguleikarin fylti rúmið við føgrum tónum. Mannagongdin, til hesa heldur óvanligu samkomu, fór so nøkulunda soleiðis fram:

Hálvgum átta legði Heri Joensen, prestur í Vesturkirkjuni fyri, við at bjóða øllum vælkomnum - okkum á móðurmálinum og profetinum á enskum. Heri Joensen, endurgav síðani úr Fyrra Korintbr. 3,10-17, m.a. at ...."annan grundvøll kann ongin leggja, enn tann sum lagdur er". Skiljast møguliga soleiðis, at um onki er í tí, ið boðað verður, fellir tað burtur av sær sjálvum, ella kemur tað at bera frukt. Erla Maria Simonsen, umboð fyri "True life in God" í Føroyum, lýsti síðani stutt ævisøguna hjá Vassulu Rýden (www.Vassula.dk)

Tríggir sálmar vóru: Í byrjani, "Nærri mín Gud til tín". Eftir at profeturin hevði røtt um Heilaga Andan, "Hægstur Heilagi Andi". At enda, "Nú takki Gudi øll, við hjarta, munni, hendi...".Kirkjan var skrýdd frammi við altarið við einari Kristus andlitsmynd í miðjuni, hvørju menna við, stóðu myndir av "Mariu og Jesusbarninum" og heildarmynd av Jesusi.

Opinberingar um, Guds kærleika, nærleika, skapan, offur, frið, læru og lív.

Vassula Rýden, profetur bar fram boðskap sín frá prædikustólinum. Har stóð vakra kvinnan við ljósum, longum hári og tosaði á ein stillføran hátt, uttan hóvasták, hvørki við rødd ella rørslum. Ein vanlig kvinna, "átrúnaðarliga óroynd og trúarsamfelagsliga nakin", tá opinberingarnar byrjaðu í 1985, og øðrvísi sá hon heldur ikki út hesa løtu. Hon spurdi fyrst, hvør skilti og ikki skilti enskt. Nøkur fá tilkomin fólk vóru tey einastu, ið ikki skilti enskt. Tey fóru so í annað rúm, niðurundir, við einum tulki. Hon endurtók ævisøgu sína, áðrenn opinberingarnar byrjaðu, fyri síðani at greiða frá, hvussu opinberingarnar komu. Hon bar boðskapin úr opinberingunum fram beinleiðis, og gjøgnum upplestur fest á blað. "Skiftið" millum at uppliva persónin Vassulu og opinberaða boðskap hennara var sjálvsamt og spennandi.

Vassula fekk fólkið at reisast, meðan hon á aramæiskum, Jesus´ar móðurmáli, bað bønina "Faðir vár". Vassula talaði í umleið hálvanannan tíma og mannagongdin var m.a.: Ævisøgan, opinberingar, Gudfrøðin/ trúarlæran útfrá opinberingum, bøn, leking og vælsignilsi við krossins tekin.

## Fólkið hugtikið

Áhugavert var at uppliva "stemningin" í Vesturkirkjuni. Fólk vóru opin, spent og alt gekk so stillført og virðiliga fyri seg. "Ekta", var orðingin fleiri fólk nýttu, tá ið tey málbóru seg um upplivilsi í Vesturkirkjuni.

"Týðuligt var, at fólk lurtaðu væl. Tað var øgiliga friðaligt. Fólk vildu fegin hoyra tað hon segði", heldur H.J.Joensen bispur, ið var staddur í Vesturkirkjuni týskvøldið.

"Eg dugdi ikki at hoyra nakað í stríddi ímóti vanligum kristindómi. Tað hon tók fram, alt er ikki so nógv frammi í dag, men er gamal kristin arvur. Kristindómur er ikki bara trúgv, men eisini lív", helt bispur fram. Til viðmerkingina og á ein hátt, undrannina á, at Vassula Rydén fekk loyvið og høvið til, at bera boðskapinum fram í Vesturkirkjuni, svaraði bispur, "At nú mugu vit ikki enda har, at um Jesus kom, at hann ikki slapp inn. Vit mugu hava eitt opið vindeyga fyri, hvat Gud vil geva".

Heri Joensen, prestur, ið hevði upplivað Vassulu Rydén í bispagarðinum, umrøddi hana sum "gemytliga".....og humoristisk var hon eisini, tá hon umrøddi sítt tætta vinalag við Jesus.

Eftir at hava upplivað føroysku áhoyrarafjøldina, undraðist Vassula yvir, at føroyingar vóru so stillir og álvasamir undir orðinum. Einastu ferð, at hon hevði upplivað líknandi áhoyrarafjøld var í Íslandi. Vassula hevur ferðast nógv kring allan heim, men ongastaðir, segði hon, vóru so vakrar áir sum í Føroyum.

Erla Maria Simonsen og Árni Brekku skipaðu fyri tí praktiska í sambandi við vitjanina hjá Vassulu Rydén. Opinberingarnar eru týddar til føroyskt, "Satt lív í kristi", eftir Erla Maria Simonsen og vóru útflýggjaðar ókeypis við útgongdina

Tey, ið vildu kundu lata eitt oyra til barnaheimini, ið Vassula Rydén hevur stovnað. Tey telja 30 heim í dag.

Út- og sjónvarp vóru tilstaðar í Vesturkirkjuni. Sostatt verður meira at frætta í fjølmiðlunum um profetin í Vesturkirkjuni. Í næstu viku hevur Sosialurin samrøðu við fólk frá ymiskum trúarsamfeløgum í Føroyum, ið vóru í Vesturkirkjuni og hoyrdu Vassulu Rydén.








Martin W. Restorff · Stjóri á Hafnia · 28 ár

Lýs teg sjálvan við trimum orðum.
- Áááá, ja eg roknaði við , at hasin spurningurin fór at koma... Sjálvstøðugur, matglaður og ... positivur! Tað haldi eg...

Hvat orð nýtir tú oftast?
- Haha, ja tað má vera: Eg eri svangur.

Hvørjum hyggur tú at hjá hinum kyninum?
- Eygunum.

Hvussu langa tíð nýtir tú at gera teg kláran um morgunin?
- Eg veit faktiskt ikki, havi ongantíð tikið tíð enn... Men tað man vera umleið eitt korter. Tá fari eg í bað og alt.

Hvat stressar teg?
- Eg verði stressaður, tá fólk ikki møta til tíðina!

Hvat gleðir teg?
- Ja, hvat gleðir meg? At hava nógv at gera. Eg elski, tá eg havi ordiliga nógv at gera.

Nær feldi tú seinast eitt tár?
- Tú ja, tað var á Ólavsøku, tá eg var til Amin Jensen show. Tá græt eg simpulten, tí eg flenti so nógv. Tað var so stuttligt...

Nær smakkaði tú tær seinast á?
- Tað gjørdi eg faktiskt fyri einum tíma síðani, tá eg smakkaði eitt nýtt vín. Eg elski vín, og vit fáa ofta nýggjar prøvar sendandi, sum eg so skal smakka á. Deiligt arbeiði, ha?

Um tú vart landsstýrisfólk, hvat málsøkið vildi tú so umsitið?
- Fíggjarmál, tí økonomi hevur mín áhuga. Tað er tað, sum interesserar meg mest.

Hvat er besta uppfinning?
- Ja, hvat skal man siga har? Tað man vera... jú, eftirsum eg havi so nógv við mat at gera, so haldi eg, at tað er ovnurin. Ja, tað sigi eg. Ovnurin, so man kann gera mat!

Nær flutti tú heimanífrá?
- Tá eg var 18 ár, flutti eg til Keypmannahavnar í útbúgvingarørindum.

Hvat kostar ein pakki við fimm sikringum á 10 ampere frá Eli?
-Ein pakki av sikringum?? Og hann skal vera frá Eli, haha... Hann kostar 16,50.
Nei Martin, dýrari enn so, hann kostar 24.95

Nú fíggjarlógaruppskotið er lagt fram, vísti úrslitið eitt hall uppá fleiri milliónir. Hvussu nógvar?
- Oy jøssus ikki, eg hugsaði tað altíð, at fíggjarlógin fór at koma við... Hallið á fíggjarlógini... Tað var ein góð ein! Eg má bara skjóta, eg sigi 195 milliónir.
Væl var skotið, tú rakti "bara" 2 milliónir við síðuna av. Hallið er roknað at verða 193 milliónir kr.

Títt besta praktiska ráð...
- Ja, hvat skal tað vera.. Eg haldi tað er, at tú skalt vera tú sjálvur, og gera tað sum tú hevur hug til og ert best til.

Hvør skal næstu ferð setast í bláa stólin?
- Tú ja, eg havi tonkt uppá ein mann til næstu ferð. Hann eitur Bogi Andreasen og arbeiðir á Margarinfabrikkini. Hann hevur gjørt eitt ótrúliga stórt ungdómsarbeiði, og eg hevði gott kunnað tonkt mær at sæð hann í stólinum.